## Var ikki nyttuleyst

**Hóast tapið í valdystinum, so heldur Birgir Enghamar á ongan hátt, at uppstillingin var nyttuleys. – Feløgini høvdu møguleikan at vísa sína ónøgd, og tað gjørdu tey eisini**

FSF-VALIÐ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast hann júst hevði tapt, so líktist hann ikki einum tapar. Birgir Enghamar reistist tvørtur ímóti og bað um orðið, áðrenn aðalfundurin varð slitin.

– Eg haldi, at talan var um ein fair-dyst, men tað er sjálvandi eitt sindur keðiligt, at formansatkvøðan á hendan hátt skuldi verða avgerandi.

– Men eg haldi kor-tini á ongan hátt, at uppstillingin var nyttuleys. Við at vísa á ónøgdina, sum valdar innan ymisk øki, var eg við til tað allarseinasta, og tað haldi eg hevur givið nevndini nakað at hugsa um. Skal metast eftir formansfrágreiðingini, sum varð løgd fyri aðalfundin, so er hetta eisini nakað, sum partvíst er tikið til eftirtektar, og tað er í øllum førum nakað, sum eg fegnist um. Verður tað nú handlað í samsvar við tað, sum er sagt, so haldi eg í øllum førum, at hetta hevur givið úrslit. Tí tað er ikki persónurin sjálvur, men arbeiðið, sum hesin stendur fyri, ið gevur úrslit, staðfestir hann.

Og eftirfylgjandi kundi hann væl hýrdur leggja afturat, at hann sum so ikki hevði nakað ímóti, at Óli Holm framhaldandi er formaður í FSF.

– Eg havi einki sum helst ímóti Óla. Hann er ein fittur persónur, og sum suðuroyingar flestir, so er hann væl skorin fyri tungubandið. Men eg haldi nú kortini, at hann eisini átti at lært seg at lufta betri, tá ting verða førd fram, helt Birgir Enghamar at enda.



*Sjálvandi skulu mótvalevni hava loyvi at stilla upp. Tað er júst tað, sum tryggjar fólkaræðið í Fótbóltssambandinum, helt Óli Holm eftir fundin leygardagin*
*Mynd: Álvur*

# Óli var avkláraður

**Hóast hann tóktist illa sperdur, tá atkvøðuseðlarnir vórðu taldir upp. So staðfesti Óli Holm, at hann var púrasta avkláraður um støðuna**

FSF-VAL
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Hatta er so ein av teimum støðunum, sum tú ikki vónar at uppliva alt ov ofta.

Soleiðis staðfesti Óli Holm, tá hann eftir uppteljingina av formansvalinum skuldi takka aðalfundinum fyri tað álit, sum hóast alt varð sýnt honum.

Við orðunum um, at hann sjálvandi hevði stillað upp, tí hann hevði ætlanir um framhaldandi at virka sum formaður, hevði hann júst staðfest sína egnu støðu. Ein støða, sum tó ikki var vís, fyrr enn seinasta atkvøðan varð tald upp.

### Fólkaræði skal valda

Hóast hann undir atkvøðugreiðsluni tóktist rættiliga sperdur, so staðfesti Óli Holm, at hann alla tíðina var púrasta avkláraður um møguleikan, at hann kundi fella.

– Eg havi alla tíðina sagt, at vit hava eitt fólkaræði innan føroyskan fótbólt. Eitt fólkaræði, sum gevur einum og hvørjum rætt at stilla upp, og soleiðis eigur tað eisini at vera. Tað skal vera so, tí FSF er jú organið hjá føroysku fótbóltsfeløgunum.

– Men tað er givið, at tað íkoma spenningar, tá støðan verður somikið tøtt. Skapti tað ongan spenning, so haldi eg ikki, at eg var egnaður at sita her, helt hann.

Formansrøðan hjá tær tóktist í stóran mun sum aftursvar til tað, sum Birgir Enghamar hevur ført fram.

*Var hetta eina verjurøða hjá sitandi formanninum?*

– Ikki sum so. Men hon tók støði í tí, sum er hent seinnu árini. Eg eri sannførdur um, at FSF ikki áður hevur verið ein somikið opin felagsskapur við somikið stórum gjøgnumskygni, sum hann er tað í dag. Júst hetta eru mál, sum vit hava nýtt nógva orku fyri at røkka, men við hesum er ikki sagt, at tað ikki kann gerast betri. Eitt nú kundi eg hugsað mær, at fundirnir við formenninar í størri mun bera brá av kaffifundum tvørtur um borðið, heldur enn um fundir, har FSF tosar við feløgini.

### Ræðist ikki tvíbýti

Ein vandi, sum altíð er til staðar, tá talan er um somikið javnar atkvøðugreiðslur, er framtíðar virkisførleikin hjá leiðsluni. Sjálvandi er formaðurin valdur fyri tvey ár. Men tá stórar avgerðir skulu takast, verða hesar ofta lættari, tá tað er ein breiður meiriluti, sum hevur sett krossin til vinnandi partin.

Sum so var Óli ikki ósamdur í hesum. Men hetta tóktist tó ikki vera ein støða, sum hann ber nakran ótta fyri.

– Sjálvandi kundi eg ynskt, at talan var um ein breiðari meiriluta. Men vit mugu nú eina ferð arbeiða út frá veruleikanum, soleiðis sum hann sær út. Tað er tó greitt, at vit í størri mun mugu leggja okkum eftir at samansjóða partarnar. Tí er tað nakað, sum er tungtvigandi hjá føroyskum fótbólti, so er tað, at lyft verður í felag.

*Vil tað so eisini siga, at nakrar av atfinningunum hjá mótstøðumanninum eru tiknar til eftirtektar?*

– Sum eg havi sagt, so ræður um at finna felags stev. Og tað kann væl merkja, at støður av ymsum slag mugu mýkjast nakað báðar vegir.

Men ert tú ikki bangin fyri, at føroyski fótbólturin skal fara í tveir bólkar eftir hetta. Tveir bólkar, sum fara at draga hvør sín veg?

– Tað havi eg onga orsøk at halda. Hetta er ein felagsskapur, og skulu vit vinna framá, so eru vit noydd at standa saman, staðfesti formaðurin at enda.

# Nálareygað er nú minni

**Drúgt - og til tíðir kensluborið - orðaskifti var um niðurflytingarspurningin. Endin varð tó, at ein breiður meiriluti atkvøddi fyri, at eingir eyka dystir verða um upp- og niðurflyting**

FSF-FUNDUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tann lógarbroytingin, sum fekk drúgvastu umrøðuna á aðalfundinum, var uttan iva uppskotið um, at tað nú aftur skal verða so, at tvey lið flyta beinleiðis upp og niður millum deildirnar.

Við at kaga at stigatalvuni, soleiðis sum hon endaði í fjør, so var ikki løgið, at GÍ var eitt av feløgunum, sum oftast hevði orðið hesum viðvíkjandi.

Janus Rasmussen, nývaldur formaður, helt, at ein slík broyting fyrst og fremst vildið minkað um kappingarmomentið í lægri deildunum. Ein póstandur, sum gekk beint ímóti tí, sum formaðurin í kappingarnevndini annars førdi fram, tá lógaruppskotið varð lagt fyri aðalfundin.

Men tað vóru ikki øll, sum vóru samd í GÍ-formanninum. Serliga var tað skyldmaðurin, Atli Gregersen, sum er formaður í SÍF, sum argumenteraði ímóti hesum.

Viðvíkjandi kappingarmomentinum, so helt hann, at hetta bara kundi styrkja um hetta. serstakliga í bestu deildini, har hann helt, at tað var »ov lætt« hjá feløgunum at sleppa undan niðurflyting. Í fyrsta lagi, so ráddi bert um at sleppa undan niðasta sessinum, tí við heilum ári í hægri tempo í beinunum, hevði eitt Formula-lið ovurstóran fyrimun til seinastu dystirnar undir verandi skipan. Hann vildi vera við, at fóru tvey beinleiðis niður, so vildi hetta viðført, at tyngri endin av bestu deildini í nógv størri mun syrgdi fyri neyðuga styrkinum tíðliga á árinum.

Hartil vísi hann á truplu støðuna, sum feløg í aðru deild eru í. At nálareygað at sleppa upp í lovaða landið,